# GERÐABÓK – BÝRÁÐSFUNDUR 09/2020

**Dagfesting:** 29.10.2020 kl. 19:00

Møtt vóru: Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Kristian Petersen, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni, Árant Berjastein, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen og Sigurð Simonsen

Vara limir:

Ikki møtt:

Skrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| 4/20 | 20/00510-4 | Skipan av ídnaðarøki á Kambsdali – uppskot frá borgarstjóranum | 2 |
| 5/20 | 20/00224-1 | Nýtt móttøkupláss á Kambsdali | 4 |
| 6/20 | 20/00127-8 | Umbøn um eykajáttan í sambandi við innrætting av nýggja býráðshúsinum | 9 |
| 07/20 | 20/00081-6 | Umbøn um eykajáttan til Nánd fyri 2020 | 11 |
| 08/20 | 20/00477-2 | Góðkenning av sølu av bygningi - matr.nr. 239aa | 13 |
| 09/20 | 20/00153-6 | Ungdómshús. Uppskot | 15 |

## 4/20
## 20/00510-4 Skipan av ídnaðarøki á Kambsdali - uppskot frá borgarstjóranum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 15.10.2020 | 18/20 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 4/20 |

Tilráðing

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini | |
|---|---|---|
| Stutt lýsing | Borgarstjórin hevur heitt á ráðgevan «Teknistovan» Gøta um at gera eitt skipanaruppskot til innrættan av ídnaðarøki á Kambsdali. Uppskotið er í tveimum pørtum. Ovari parturin er innrættaður til smærri virkir. Økið liggur norðanfyri verandi sethúsaøkið. Økið er gjørt til sethúsaøki, so her má byggisamtyktin broytast til vinnuøki.<br>Niðari parturin er skipaður til størri virkir, sum líkist tí virkseminum, sum er í økinum í dag.<br>Uppskotið leggur eisini upp til at gera sambindingarvegir í økinum.<br>Atlit eru eisini tikin til tað umhvørvisliga, soleiðis at ein volli verður gjørdur framvið vegjaðaranum, sum er næmast sethúsaøkinum.<br><br>**Ískoyti 23. oktober 2020**<br>Vinnu- og havnanevndin, ið viðgjørdi málið á fundi 15. oktober í ár, ynskir hetta uppskot frá borgarstjóranum, um at skipa vinnuøki út á Kambsdali, til hoyringar hjá býráðnum. | |
| Bakgrund | Uppskot frá borgarstjóranum um at skipa vinnuøkið úti á Kambsdali. | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK 17<br>• **Fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 20/00510-1 Bræv við uppskoti frá borgarstjóranum<br>FK j. nr. 20/00510-2 Kort yvir økið á Kambsdali | |
| Viðgerð | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar / Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja / Ja |
| | Umsitingarligar | Ja / Ja |
| Tilmæli | Fyrisitingin mælir til, at taka undir við uppskotinum til at broyta verandi bústaðarøki til vinnuøki norðan fyri bygt sethúsaøki. | |
| Dagf | 15. oktober 2020. | |

**Vinnu- og havnanevndin 15. oktober 2020**
Nevndin mælir til at dispositiónsuppskotið til heildalætlan fyri vinnuøkið á Kambsdali verður sent býráðnum til hoyringar.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at beina málið í teknisku deild til víðari viðgerð við atliti til møguliga at broyta byggisamtyktina fyri økið og at hava kunningarfund við íbúgvar á Kambsdali viðvíkjandi skipan av vinnuøkinum.

**5/20**
**20/00224-1 Nýtt móttøkupláss á Kambsdali Nevndarviðgerð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.04.2020 | 15/20 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 24.04.2020 | 7/20 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 17.07.2020 | 11/20 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 15.10.2020 | 17/20 |
| 5 Býráðið | 29.10.2020 | 5/20 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd og vinnu- og havnamevndini. |
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur gjørt eitt høvuðsprosjekt av nýggja móttøkuplássinum á Kambsdali á sama øki, har sum oljureinsiverkið hjá IRF húsaðist fyrr. Tí verður ætlanin løgd fyri teknisku nevnd til góðkenningar, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út skjótt.<br><br>**Uttanumøkið**<br>Partur av útiøkinum er asfalterað. Umleið ein triðingur av økinum er grovplanerað.<br>Ein stórur tangagarður er staðsettur vestanfyri sjálvan bygningin.<br><br>**Bygningur og tangagarður**<br>Á økinum stendur ein bygningur, sum er gjørdur av isoleraðum betongelementum, sokallaðum Sandwich-elementum. Gólvið er eisini isolerað. Takið er úr tjørupapp og gólvini eru stoypt.<br><br>Omanfyri bygningin er ein tangagarður úr betong, har gólvið og garðurin er staðstoypt.<br><br>Sunnanvert tangagarðin eru tríggir smærri tangagarðar, sum eru staðstoyptir.<br>Partur av økinum sunnanvert bygningin er staðstoyptur ein plattur við frárensli.<br><br>**Støðulýsing av bygninginum**<br>Takið er ótætt í støðum<br>Elementfugurnar eru dotnar úr í summum førum.<br>Betongelementini eru eitt sindur viðtikin.<br><br>**Støðulýsing av uttanumøkinum**<br>Asfaltið sær út til at vera í nøkunlunda standi.<br>Á økinum, sum er grovplanerað, er gróður komin í.<br>Betonggarðurin rundan um økið er ikki í góðum standi.<br>Hegnið er slitið og holut nógvastaðni. Hegnið yvirheldur nokk ikki standardin sum krevst til eitt slíkt móttøkupláss.<br>Vinkuljørnini, sum halda hegninum, eru rustaði nakað. |

| | |
|---|---|
| | **Nýtt móttøkupláss á Kambsdali**<br>Umsitingin hevur gjørt eitt høvuðsprosjekt av einum nýggjum móttøkuplássi á Kambsdali.<br>Ætlanin er at brúka so nógv sum gjørligt aftur av verandi planering, betonggørðum, tekniskum leiðingum og sjálvum bygninginum.<br>Í høvuðsheitum verður arbeiðið býtt soleiðis upp<br>1. Fínplanerað økið, sum er grovplanerað, av nýggjum<br>2. Stoypa sama økið við armering<br>3. Leggja regn- og skittvatnskloakk við tilhoyrandi reinsibrunnum<br>4. Leggja dragirør til tekniskar installatiónir<br>    a. Dragirør til ljósmastrar<br>    b. Dragirør til fipur<br>5. Seta ljósmastrar upp á økinum<br>6. Seta camera á ljósmastrar<br>7. Stoypa stuðlamúr vestur ímóti Poul Joensen<br>8. Stoypa verandi lágar betonggarðar av nýggjum<br>9. Seta dagført hegn upp og bora nýgg rør niður í betonggarðin<br>10. Seta tvey nýggj portur á inn- og útkoyring<br>11. Dagføra bygningin, soleiðis at hann kann nýtast sum renovatiónskontór, kantinu, skrivstovu til gartnaradeildina og vegadeildina, toalettir og brúsu og eitt lítið verkstað<br><br>**Raðfesting**<br>1. Gera betongarbeiðið á økinum til byngjur<br>2. Stuðlagarð framvið økinum<br>3. Seta ljósmastrar upp<br>4. Flytan av portali inn til økið<br>5. Seta nýgg portur í inn- og útkoyring<br>6. Kloakkering<br>7. Grøv til tekniskar leiðingar<br>8. Dagføring av bygninginum<br>    a. Leggja nýtt tak á<br>    b. Klæða bygningin<br>    c. Innrætta hann av nýggjum<br>9. Niðurleggja ruskøkið á Klovningi og hampa lendið<br>10. Seta stálhøll niður á verandi tangagarð til vega- og gartnaradeildina<br><br>Útbjóðingartilfarið verður gjørt soleiðis, at trý alternativ verða at bjóða uppá.<br>Tá tilboðini koma inn, so kann raðfestast eftir tøkari íløguætlan fyri í ár til verkætlanina.<br>**Tíðarætlan**<br>1. Útboð í viku 18<br>2. Lisitatión 14. mai<br>3. Arbeiðið fer í gongd 25 mai<br><br>**Tekniska nevnd skal taka støðu til**<br>1. Høvuðsprosjektið<br>2. Raðfestingina<br>3. Útbjóðingarhátt |

| | |
|---|---|
| | 4. Tíðarætlan<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 24. apríl 2020**<br>Málið um móttøkuplássið hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd 12. apríl, har tekniska verkætlanin bleiv góðkend.<br>Vinnu- og havnanevndin varar av móttøkuplássinum, tá renovatión liggur undir fíggjarøki nr. 7.<br>Nevndin skal taka støðu til tað teknisku verkætlanina, raðfesting, útbjóðingarhátt og tíðarætlan.<br><br>**Ískoyti**<br>IRF hevur gjørt nýggja mannagongd í sambandi við skiljingina av ruski á einum móttøkuplássi. Umsitingin hevur verið á fundi við umhvørvisleiðaran hjá IRF um hesi viðurskifti, soleiðis at verkæalanin «Nýtt móttøkupláss á Kambsdali» verður tillaga til nýggju krøvini.<br>Eisini hevur umsitingin vitja móttøkuplássið hjá Klaksvíkar kommunu norðuri í Ánunum fyri at fáa góð ráð frá teimum.<br>Eisini hevur hon kannað, hvørjum øki onnur móttøkupláss hjá øðrum kommunun eru staðsett. Í Eystur kommunu liggur økið í vinnuøki, og í Tórshavnar kommunu liggur økið í vinnuøki inni á Hjalla, har sum kommunala brennustøðin er staðsett.<br>Umsitingin hevur latið gjørt útbjóðingartilfar í sambandi við verkætlanina.<br>Arbeiðið bleiv boðið út 6. juli 2020 sum innboðin lisitatión millum 7 arbeiðstakarar. Ástaðarfundur var 7. juli á økinum millum umboð fyri allar arbeiðstakarar og umboð fyri kommununa.<br>Lisitatión varð hildin á digitalum verkætlanarportali iBinder 15. juli 2020 kl. 18.00.<br><br>**Inn komi trý tilboð frá hesum arbeiðstakarum**<br>1. Poul Joensen Fa<br>2. Norðhús Sp/f<br>3. TN Bygging Sp/f<br><br>Víst verður til lisitatiónsprotokollina, sí FK j. nr. 20/00364-4.<br><br>**Ískoyti 12/10-2020**<br>Eftir áheitan frá formanninum í vinnu- og havnanevndini verður málið tikið upp aftur til nýggja viðgerð.<br><br>**Ískoyti 15/10-2020**<br>Fundur hevur verið við JT Electric í dag, har kommunan saman við JT Electric hevur funnið eina góða loysn fyri báðar partar. Uppskotið um loysn tekur støði í umsóknini um at víðka matrikkulin vestureftir, har ynski er um at fara longur niðan undir ein komandi vinnuveg (útstykkingarveg).<br><br>Havandi í huga, at ein býráðssamtykt fyriliggur í málinum, har Fuglafjarðar kommunu keypti økið frá IRF til at brúka sum móttøkupláss, so hevur fyrisitingin mett, at tað er grundarlag fyri at arbeiða víðari við málinum. |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Fyrimunir við hesari loysn er, at móttøkuplássið verður virkið allan arbeiðsdagin í og við at tað er ætlanin, at starvsfólk á rakstrarstøðunum vega- og gartnaradeildin í framtíðini koma at hava sítt virksemi á sama stað sum móttøkuplássi. «Synergi-effektin» av hesum er, at virksemið á móttøkuplássinum kann verða avgreitt av starvsfólkum á vega- og gartnaradeildini. Samtíðis sum nevndu starvsfólk fáa nýggj hølisviðurskifti. Eisini er ein fyrimunur, at vinnuliga virksemið á Kambsdali verður betur servisera í og við at móttøkuplássi er á staðnum.<br><br>Vansar kunnu verða, at kommunan tekur burtur ein minni part av verandi vinnuøki. Harumframt hava fólk í økinum borið fram klagu til kommununa, har tey mótmæla einum móttøkuplássi. Kommunan hevur kanska ikki kunna nógv væl um fyrimunirnar við einum móttøkuplássi sum hesum, tí móttøkuplássi verður væl skipað eisini í mun til organiskt og óorganiskt tilfar.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Dagføring av renovatiónsøkinum hjá Fuglafjarðar kommunu. Ætlanin er at avtaka ruskøkið á Klovningi og gera økið aftur í upprunaligan stand.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Byggisamtyktin<br>Umhvørvisverndarlógin<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 20/00225-1 Tekningar av verandi øki<br>FK j. nr. 20/00225-2 Tekningar av nýggjum móttøkuplássi<br>FK j. nr. 20/00364-4 Lisitatiónsprotokoll</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Umsitingin mælir til at góðkenna høvuðprosjektið.<br><br>Nýtt tilmæli<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 2.303.777,- og at fara í samráðingar við arbeiðstakaran. Mælt verður til at gera avtalu við arbeiðstakaran Poul Joensen Fa um at gera arbeiðið, sum svarar til avsetta peningin til nýtt móttøkupláss í ár, og játtað pening til liðugtgerð í fíggjarárinum 2021.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">21. apríl 2020.</td></tr>
</table>

**Tekniska nevnd 23. april 2020**
Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, og gera útbjóðingartilfarið soleiðis, at endaligi kostnaðurin av arbeiðnum er stemma av við galdandi játtan á kr. 1.000.000,- til móttøkuplássið.

**Vinnu- og havnanevndin 24. april 2020**
Nevndin heldur gott um innrætting av økinum, men sambært byggisamtyktini, er økið lagt út sum vinnuøki. Um haldast skal fast um hetta økið, so má ein serlig byggisamtykt gerast fyri økið, og byggisamtyktin broytast. Eisini eiga onnur økir at blivi kannaði nærri, eitt nú tey bæði grundøkini niðanfyri landsvegin, sum liggja undir økið H.

**Vinnu- og havnanevndin 17. juli 2020**
Ein samd nevnd mælir til at útseta málið til næsta vinnunevndarfund.

**Vinnu- og havnanevndin 15. oktober 2020**
Nevndin mælir til at leggja málið fyri býráðið til endaliga støðutakan.

Eitt minnilutauppskot frá Sigurði Simonsen vísir til samtyktin í vinnu- og havnanevndini 24. apríl 2020.
*Nevndin heldur gott um innrætting av økinum, men sambært byggisamtyktini, er økið lagt út sum vinnuøki. Um haldast skal fast um hetta økið, so má ein serlig byggisamtykt gerast fyri økið, og byggisamtyktin broytast. Eisini eiga onnur økir at blivi kannaði nærri, eitt nú tey bæði grundøkini niðanfyri landsvegin, sum liggja undir økið H.*

**Býráðið 29. oktober 2020**

Býráðið samtykti, at fylgja tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini, at skipað eitt móttøkupláss á Kambsdali og at borgarar á Kambsdali í hesum sambandi verða væl kunnaðir (5-3-1). Sonni á Horni, Kristian Petersen, Eivin Breiðaskarð Ólavur Larsen og Magni Jøkladal tóku undir við málinum. Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Árant Berjastein atkvøddi blankt.

## 6/20
## 20/00127-8 Umbøn um eykajáttan í sambandi við innrætting av nýggja býráðshúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2020 | 8/20 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 6/20 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Í sambandi við at fyrisitingin hjá Fuglafjarðar kommunu flytir úr verandi bygningi á Ennivegi, tí har er staðfestur blámusoppur, hevur tekniska deild gjørt uppskot til fyribils innrætting av nýggja býráðshúsinum, sum kommunan hevur keypt frá Eik-Banka, til skrivstovuhølir hjá fyrisitingini umframt býráðssal. 5 starvsfólk fara í fyrsta umfari at halda til í nýggja býráðshúsinum. Uppskotið hjá teknisku deild er í trá við uppskot 6 (D1) hjá Arkitektum 99, ið hava verið inni í myndini í sambandi við fyrireiking av innrættingini.<br><br>Innrætting til skrivstovuhøli er eisini gjørd í hølini hjá «Bassa», har Framherji nýliga hevur hildið til, tí pláss er ikki fyri øllum starvsfólkum í nýggja býráðshúsinum. Fuglafjarðar kommuna leigar fyribils hølini frá Bassa, har 6 starvsfólk fara at halda til.<br><br>Tilgongdin í mun til innrætting og innbúgv er farin fram í samráði við starvsfólkini.<br><br>Tað er neyðugt við einari eykajáttan á kr. 2.280.000,- v/mvg í sambandi við innrættingina av nevndu hølum, sí kostnaðarmeting í notati, dagfest 9. oktober 2020, sum liggur við málinum.<br><br>Hetta er fyrsta viðgerð av umbøn um eykajáttan í sambandi við innrætting av nýggja býráðshúsinum. Samsvarandi kommunustýrislógini § 41, stk. 2 skal eykajáttanin viðgerast av býráðnum tvær ferðir við í minsta lagi 14 dagar millumbili. Eykajáttanin verður fíggjað av gjaldførinum. |
| Bakgrund | Staðfestur blámusoppur í verandi hølum á kommunuskrivstovuni, Ennivegur 38 í Fuglafirði. |
| Grundarlag | Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• **Kommunustýrislóg, Arbeiðsumhvørvislóg**<br>Møgulig fylgiskjøl<br>• **Notat, dagfest 9. oktober 2020, kostnaðarmeting og frágreiðing í mun til hana**<br>• **Flatmynd av hølum í nýggja býráðshúsinum**<br>• **Flatmynd av hølum hjá Bassa**<br>• **Fundarfrágreiðing, dagfest 25. september 2020** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | • **Uppskot D1 hjá Arkitektum 99** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Fyrisitingin hjá Fuglafjarðar kommunu mælir til, at taka undir við uppskotinum frá teknisku deild til innrætting av nevndu hølum og at samtykkja eina eykajáttan á kr. 2.280.000,- v/mvg í hesum sambandi. | | |
| Dagf | 16/10-2020 | | |

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2020**
Fíggjarnevndin varð kunnað um status viðvíkjandi innflyting í hølini hjá ávíkavist «Bassa» og Eik-bygningin mánaðarskiftið oktober/november og november/desember. Fíggjarnevndin samtykti einmælt eina eykajáttan á kr. 2.280.000 v/mvg.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Býráðið samtykti, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, og beina málið til 2. viðgerð (8-1). Sonni á Horni, Kristian Petersen, Ólavur Larsen, Eivin Breiðaskarð, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni og Árant Berjastein tóku undir við málinum. Sigurð S. Simonsen atkvøddi ímóti.

## 7/20
## 20/00081-6 Umbøn um eykajáttan til Nánd fyri 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2020 | 10/20 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 7/20 |

## Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini | | |
| Stutt lýsing | Stýrið fyri Nánd samtykti tann 14. februar í ár fíggjarætlanina fyri 2020, har samlaða nettoútreiðslan verður kr. 40.484.813,00, harav verður gjaldið frá Fuglafjarðar kommunu kr. 19.451.972,00.<br><br>Í fíggjarætlanini hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020 eru á rakstrarstaði 285, konto 7140-00, avsettar 19. mió. kr. til Nánd. Tað mangla sostatt kr. 451.972,- í fyri at rinda kommununar part av rakstrinum av eldraøkinum fyri 2020. Fíggjarnevndin hevur á fundi 18. februar í ár samtykt, at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini hjá stýrinum fyri Nánd fyri 2020. Á fundi 21 apríl í ár samtykti fíggjarnevndin, at útseta viðgerðina av hesi eykajáttan til seinni í ár.<br><br>Eykajáttanin kann fíggjast av gjaldførinum hjá Fuglafjarðar kommunu.<br><br>Samsvarandi kommunustýrislógini § 41, stk. 2 skal umbønin um eykajáttan viðgerast á tveimum býráðsfundum við í minsta lagi 14 daga millumbili. | | |
| Bakgrund | Raksturin av eldraøkinum Nánd varð dýrari enn Fuglafjarðar býráð metti í fíggjarætlan kommununar fyri 2020. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin, fíggjarætlanin**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Skriv, dagfest 31. januar 2020, um fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2020**<br>**Skriv, dagfest 21. apríl 2020, um fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2020** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Borgarstjóri, kommunustjóri og fíggjarleiðari mæla til, at ein eykajáttan á kr. 451.972,- verður veitt soleiðis at Fuglafjarðar kommuna kann gjalda sín part av rakstrinum viðvíkjandi eldrasamstarvinum Nánd. | | |

| | |
|---|---|
| Dagf | 16/10-2020 |

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt eykajáttanina á kr. 451.972,- til raksturin av Nánd.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, og beina málið til 2. viðgerð.

## 8/20
## 20/00477-2 Góðkenning av sølu av bygningi - matr.nr. 239aa

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 15.10.2020 | 16/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2020 | 11/20 |
| 3 Býráðið | 29.10.2020 | 8/20 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini |
|---|---|
| Stutt málslýsing | Bygningurin hjá P/f Petur Larsen verður í næstum seldur. Yvirtøkudagurin verður væntandi 1. oktober 2020.<br><br>Sølan er treytað av, at Fuglafjarðar Kommunu góðtekur ognarskiftið og nýggjan leigara, sum framyvir verður Sp/f frá 30.05.2007, skrás.nr. 4739. (Páll Gregersen).<br><br>Advokaturin hjá keypara og seljara, Mimi Steintórsdóttir, biður Fuglafjarðar Kommunu um at viðgerða áheitan um at góðtaka ognarskiftið og nýggja leigaran. Verður hetta játtað, verður samstundis heitt á kommununa at undirrita viðhefta skeytið.<br><br>Harumframt heitir nevndi advokatur á Fuglafjarðar kommunu um at gera átekning til galdandi leigusáttmála, sum er 2016 og avlýsa sáttmálan frá 2001.<br><br>Avvarðandi nevndir og býráðið skulu taka støðu til tvinni viðurskifti í hesum máli:<br>• Góðtaka ognarskiftið.<br>• Góðtaka nýggja leigaran, sum ynskir at yvirtaka verandi leigumál hjá P/f Petur Larsen.<br><br>**Ískoyti 19. oktober 2020**<br>Málið hevur verið viðgjørt í Vinnu- og havnanevndini, sum góðkennir ognarskiftið og nýggja leigaran við nøkrum broytingum í sáttmálanum. Fuglafjarðar kommuna skal ikki gjalda tinglýsingarkostnaðin. |
| Bakgrund | Bygningurin hjá P/f Petur Larsen, matr.nr. 239aa, Fuglafjørður, verður seldur í næstum. |
| Grundarlag | • Tinglýsingarlógin v.m.<br>**Fylgiskjølini eru:**<br>- Treytað skeyti í sambandi við ognarskiftið.<br>- Leigusáttmáli frá 2016.<br>- Leigusáttmáli frá 2001. |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Vinnu- og havnanevndin mælir til, at nýggjur sáttmáli verður gjørdur við nýggja eigaran. | | |
| Dagf | 15/10-2020 | | |

**Vinnu- og havnanevndin 15. oktober 2020**
Nevndin tekur undir við tilmælnum hjá kommunustjóranum við hesi broyting í §2.
Økið skal verða nýtt til smiðju-, verkstaðar-, goymslu-, skrivstovu og handilsvirksemi og annað virksemi í sambandi við umvælingar og møguliga framsleiðslu av frammanfyri standandi. Bygningur er bygdur á alt tað leigaða økið.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at góðtaka ognarskiftið og nýggja leigaran við atliti at teimum broytingum í § 2 í sáttmálanum, sum Vinnu- og havnanevndin hevur ásett.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Ólavur Larsen fór av fundinum til hetta mál á skrá vegna ógegni. Býráðið samtykti, at fylgja tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini, at góðtaka ognarskiftið og nýggja leigaran í sambandi við sølu av bygningi á matr.nr. 239aa, Fuglafjørður (8-0).

**9/20**
**20/00153-6 Ungdómshús. Uppskot.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2020 | 3/20 |
| 3 Býráðið | 29.10.2020 | 9/20 |
| 4 Sosiala nevnd | | |

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

Mál til viðgerðar: 20/00153

Málsviðgeri: Rønn Eliasen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2020 | 3/20 |

## UNGDÓMSHÚS. UPPSKOT.

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Mentamálanevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Mentanardeildin byrjaði eina royndarverkætlan við Ungdómshúsi á heysti í 2019. R7 hevði gjørt eina spurnarkanning, sum lið í avtalu R7 hevði við Fuglafjarðar kommunu, har borgarar vóru spurdir um hvat tey saknaðu av tilboðum í Fuglafirði. Eitt av hesum svarum var Ungdómshús.<br>Avgjørt var at gera eina royndarverkætlan í sept., okt. og nov. 2019 Fígging var til 3 mdr og bleiv verkætlanin evaluera av verkætlanarleiðarinum Atla Petersen og Rønn Eliasen.<br><br>Til fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020, var Ungdómshús sett á fíggjarætlanina og umbøn um 577.800 kr løgd fyri fíggjarnevnd.<br>Mælt var til at skipa Ungdómstilboðið, tríggjar dagar um vikuna, við tveimum starvsfólkum og at halda opið frá kl 17:00 til 23:00 við einum býtið í mun til aldursbólkar. |

| | |
|---|---|
| | Fíggingin til Ungdómstilboðið var á øki 534, og bað mentamálanevndin um serstakt rakstrarstað fyri ungdómshúsið. FMR viðgjørdi fyrispurningin við tí svarið, at fíggingin av økinum lá á øki 3. Børn og ung. Hinvegin fyrisitur mentamálanevndin, kvikmynda- og bókasavnsviðurskifti kommunurnar, søvn, mentanarhús, ungdómshús og onnur mál av mentanarligum týdningi í kommununi, umframt ferðavinnu og Visit Fuglafjørð.<br><br>Sum formaðurin í mentamálanevndini kunnaði nevndina um til fíggjarætlanararbeiðið, so hevur sosiala nevndin somuleiðis arbeitt við einum ungdómshúsi.<br>Tí er umráðandi at fáa klárlagt verður hvussu arbeiðið við Ungdómshúsi verður tikið upp aftur av nýggjum.<br>Semja má fáast við sosialu nevnd um útgangsstøði og við tí evaluering sum longu er gjørd, sí skjal 20/00153-2<br>Hartil má semja fáast um profil á starvfólki, og søkjast skal eftir starvsfólki.<br>Høli skulu finnast? Hvørji eru tøk? Lonin? Arbeiðsmannafelagshúsið ella gamla dansistova? sum stendur FK í boði at keypa ella annað?<br>Hvør er stutttíðarætlanin og hvør er langtíðarætlanin?<br>Seinastu tíðina hevur Fuglafjarðar kommuna havt avbjóðingar við herverki. Herverk er framt á barnagarð, skúla, mentanarhús og kommunuskrivstovu. Eisini gera borgarar vart við herverk sum er framt á privatar ognir, umframt at óðkvæmisorð eru rópt eftir ferðafólki osfr.<br><br>Tískil eigur FK at taka atlit til verandi støðu, og møguliga er eitt Ungdómshús ein møguleiki at hjálpa uppá støðuna. |
| Bakgrund | Ynskir um Ungdómshús eru latin kommununi og |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu, mentamálanevndin § 25 stk. 3. *Nevndin fyrisitur kvikmynda- og bókasavnsviðurskifti kommunurnar, søvn, mentanarhús, ungdómshús og onnur mál av mentanarligum týdningi í kommununi.*<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j.nr. 20/00153-1-5 Tilhoyrandi skjøl |

Viðgerð

| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Mælt verður til at mentamálanevndin og sosialanevnd saman við kommunustjóra og borgarstjóra taka upp fund og finna eitt arbeiðslag og ein leist at veita okkara ungdómi eitt ungdómstilboð. Mælt verður til at støðið verður tikið í tí arbeiði sum fyriliggur í málinum, sí evaluering, soleiðis at avgerð kann takast um:<br>- Hvat tilboðið umfatar:<br>- Í tíð – dg um vikuna og dagligar opningstíðir<br>- Starvfólk<br>- Hølir<br>- Avsetingar á diversum økjum<br>- Langtíðarmál fyri verkætlanina<br>Niðurstøðan verður send býráðnum til støðutakan og tikin við í fíggjarætlan kommunurnar 2021 |
| Dagf | 02.10.2020 |

**Mentamálanevndin 06. oktober 2020**
Nevndin tekur undir við uppskotinum um hvussu vit fáa málið arbeitt víðari. Nevndin er á einum máli um at finna alternativ til ung, sum vónandi kann verða ein varðandi loysn.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá Mentamálanevndini soleiðis at sosiala nevnd, mentamálanevnd, kommunustjóri og borgarstjóri í fyrsta umfari arbeiða víðari við málinum og gera uppskot til skipan av ungdómshúsi í Fuglafirði.

Fundurin lokin kl. 20:40.

Gerðabók lisin:

Sonni á Horni

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Árant Berjastein

Edva Jacobsen

Sigurð S. Simonsen

Magni Jøkladal